# en nær Ísland fer upp í ES



gjørdust vit umsíðir sjálvstøðug aftur. Og seinni komu so toskakríggini minniligu móti bretum og týskarum og tey vunnu vit. Og skulu Íslendingar so nú, eftir hesar stórhendingarnar, fara at geva útlendingum vald yvir okkum aftur? Og sleppa tí, sum vunnið varð?

Blaðm.: Men heldur tú í álvara, at allur Sjálfstæðisflokkurinn t.d. er yvirtikin av slíkum tjóðskaparromantikki? Eg tosaði við formann teirra Geir H. Haarde, forsætisráðharra, og hann vísti avgjørdur aftur øllum tosi um íslendskan ES-limaskap við nokkso ótjóðskaparligum grundgevingum.

Hjálmar Á: Sjálfstæðisflokkurinn var eisini harðliga ímóti at Ísland skuldi fara upp í EBS tann tíð tað var. Men líka veit eg, best sum var kúvendu teir eina náttina og gjørdust heitir talsmenn fyri íslendskari EBS-luttøku. Veruleikin er, at tey yngru í Sjálfstæðisflokknum, og eg hugsi her um tingmanning teirra, tey eru yvirhøvur hugaði fyri ES, hvat ið formaðurin so sigur.

Blaðm.: Tað sum serliga sýnist at aftra huginum til limaskap hjá Sjálfstæðisflokknum t.d. er spurningurin um ræði yvir tilfeinginum, eitt nú fiskastovnunum. Nógv bendir jú á, at tað verður torført hjá íslendingum at varðveita tilfeingisræðið, um álvara verður av ES-limaskapi.

Hjálmar Á.: Eg haldi, fyri mín part, ið hvussu er, at hatta ikki er ein so stórur vandi, sum mong vilja gera tað til. Tak fiskiskapin. Fiskiskapur við Ísland hevði, um vit gjørdust limir, bygt á hevdvunnin rættindi tey seinastu tretivu árini. Og síðani í hálvfjersárunum hava íslendingar so at siga einsamallir fiskað í íslendskum sjógvi. Tað eru helst bara føroyingar, sum annars kundu sett krøv um kvotur við Ísland. Aðrir hava lítið sum einki roynt her hetta tíðarskeiðið. Men sannleikin er helst, at vit fáa ikki svar upp á spurningin um tilfeingisræðið, fyrr enn vit søkja um limaskap. Tað var í øllum niðurstøðan í mínum flokki.

Blaðm.: Men er vilji í Framsóknarflokknum til at søkja um limaskap næstum?

Hjálmar Á.: Vit hava skjótt sagt ta støðu í Framsóknarflokknum, at meðan EBS-sáttmálin heldur, er ikki endiliga neyðugt at gera nakað, men hinvegin gera vit okkum grein fyri, at tað bara ein tíðarspurningur, nær EBS hvørvur. Spurningurin er hvat hendir, tá ið Noreg fer upp í ES. Og eg sigi tá og ikki um Noreg fer uppí.

Blaðm.: Men tað verður eftir øllum líkindum ikki í bræði. Støðan til ES í Noreg sýnist at vera nøkurlunda tann sama sum her. Rættiliga breið semja um, at einki hendir hesu megin 2011 í øllum førum.

Hjálmar Á.: Sum sagt, meðan EBS-sáttmálin heldur, er ikki neyðugt at gera nakað. Men støðan fer fyrr ella seinni at broytast og kanska fyrr enn seinni. Og tá ið tað hendir, krevja vit fyrst at hava fólkaatkvøðu um, hvørt søkjast skal um limaskap. Verður svarið ja, so fara vit undir tingingar við ES-embætisfólk um treytirnar. Vit seta fram okkara krøv. Tey síni. Og úrslitið, ta avtaluna, ið komið verður til, skal síðani leggjast fyri fólkið aftur til endaliga avgerð.

Blaðm.: Men er nøkur serlig undirtøka fyri ES-limaskapi í fólkinum yvirhøvur?

Hjálmar Á.: Tað unga fólkið í Íslandi, haldi eg, er sum heild meira altjóðasinnað og ræðist ikki útlandið, tvørturímóti. Útbúgvingarstigið hækkar alsamt. Fleiri og fleiri ung fara uttanlands at lesa og arbeiða og koma tey aftur við broyttum hugburði. Tey síggja Ísland og íslendingar sum ein part av evropeiska samfelagnum. Tískil er tað eftir mínum tykki ikki ein spurningur, um vit fara upp í ES, men nær vit fara.

Blaðm.: Men nær er nær? Um tíggju ár, um tjúgu ár, tretivu kanska?

Hjálmar Á.: Hatta var vanlig hugsan í Íslandi fyrst í hálvfemsunum, tá ið EBS kom á politisku dagsskránna. Kanska onkuntíð, søgdu fólk. Kanska ongantíð. Men við eitt broyttust umstøðurnar og EBS gjørdist veruleiki. Og tak støðuna til ES í Noregi t.d.. Allir teir stóru flokkarnir hava alla tíðina verið og eru fyri ES-limaskapi og fjølmiðlarnir somuleiðis, men fólkið segði tepurt nei. Og tað nei-ið vil vikna. Hatta sigur mær so mikið, at viðurskiftini kunnu broytast best sum er onkra náttina, onkra vikuna, áðrenn langt um líður. Og hvar standa vit tá. Vit evna ikki einsamøll, vit og Lichtenstein at halda EBS uppi. Tað verður alt ov dýrt.

Blaðm.: Men aftur til støðuna upp undir hetta Altingsvalið. Samfylkingin, størsti andstøðuflokkurin á Altingi, hevur nýliga givið ein bókling út undir heitinum Javnvág og framburður/ Búskaparpolitikkur við ábyrgd. Í bóklinginum verður harðliga funnist at fíggjar- og búskaparstýringini hjá sitandi stjórn. M.a. verður sagt, at grundrentan er so høg, uttanlandsskuldin so metstór, at hóttafall hvørja løtu kann koma á íslendska samfelagið. Eisini verður róð framundir, at stórar broytingar eru neyðugar í íslendskari búskapar- og fíggjarstýring, um ES-limaskapur og evru-tøka skulu koma upp á tal?

Hjálmar Á: Sjálvandi eri eg ikki samdur við tey. Støðan í íslendskum politikki í dag er einføld. Íslendingar hava ongantíð í søgu síni havt tað so gott, sum teir nú hava tað. Fyri hundrað árum síðani vóru íslendingar ein tann fátækasta tjóðin í Evropa. Í dag eru vit ein tann ríkasta. Fyri tólv árum síðani, tá ið núverandi stjórnarflokkar kastaðu saman, var stígur í samfelagnum. Stillstandur. Einki hendi. Her vóru at kalla ongar íløgur gjørdar. Arbeiðsloysið var upp á seg stórt. Men síðani tá er eitt veruligt umskifti hent. Og største broytingin er óivað tann, at vit seldu almenna telfonverkið, Landssíman, og tveir ríkisbankar og við tað loysnaði tann orka, ið skuldi til at lyfta búskapin og alt samfelagið upp úr deyðadumsinum. Nú verða íløgur gjørdar sum ongantíð fyrr. Keypiorkan hjá fólki er veksur støðugt, lønarútgjaldingar seta met og ikki bara met innanlands, men eisini í OECD-høpi. Altsamt meiri pengar verða veittir til vælferð, til almannaskipanina, til skúlaverk, til heilsuverk, til tey gomlu o.s.frv. Og alt hetta blómingarskeiðið hava tveir flokkar sitið við valdið, vit og Sjálfstæðisflokkurinn. Tað er tí næstan synd í andstøðuflokkunum, álvaratos. Teir hava tað ikki lætt. Serliga hevur tað tikið Samfylkingunni fast at sita í andstøðu. Samfylkingin er illa útgjørd til at sita í andstøðu. Og nú hevur hon longu verið í andstøðu í trý samfull valskeið. Andstøðuflokkarnir royna eyðvitað bæði lík og ólík ráð til at skapa fólki eina hugmynd av, at alt gongur av skriðuni, búskapur og vælferð á fallandi føti, men tað er ikki bara sum at siga tað, tá ið øll, andstøðan íroknað, vita at veruleikin, tíbetur, er beint tann øvuti.